# MAF í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

### Hvat er MAF

Mission Aviation Fellowship - ella MAF - er ein evangeliskur, felagskirkjuligur missiónsfelagskapur við deildum nærum runt allan heimin.

Endamálið hjá MAF er at geva gleðiboðskapinum veingir, soleiðis at so mong sum gjørligt fáa møguleikan at hoyra um Jesus sum teirra frelsara.

Fyri gott 2000 árum síðani bleiv boðskapurin um Jesu føðing borin á einglaveingjum eina náttina uttan fyri Betlehem.

Í dag verður evangeliið enn borðið á veingjum, men nú m.a. av teimum uml. 180 flogførunum hjá MAF í 30 londum í 3. heiminum.

350 familjur eru útsendar sum missionerar og arbeiða sum flogskiparar, flog-mekanikarar, administrativt starvsfólk við meira.

Aftanfyri hesi standa MAF-USA, MAF-Canada, MAF-Australia og MAF-Europa.

MAF-Europa hevur nationalar deildir í 10 Europeiskum londum, harav tann eina deildin er Maf-Danmark.

Men MAF er annað enn flogfør. MAF er á høgum tøkniligum støði við telduposti, radiotøkni, satelitnavigering v.m.

Tøkni sum hjálpir menniskjum at hoyra boðskapin um Jesus sum teirra frelsara hevur største áhuga fyri MAF..

Bæði tá flogið verður við læknum, sjúklingum, neyðhjálp, men eisini tá ið flogið verður við prestum, missionerum og evangelistum.

Hvørt sjeynda minutt døgnið runt fer eitt MAF-flogfar á flog eitt ella annað stað runt í heiminum fyri at flúgva neyðhjálp, hjálparfólk, læknar, sjúkrasystrar, prestar ella evangelistar fram til tey støð har tørvur er á hjálp.

Flogførini flúgva yvir oyðimørkum, frumskógum, fjøllum ella mýridíkum, har flutningur á jørðini er sera torførur og tíðarkrevjandi.

### Allan Conrad á føroyavitjan

Allan Conrad er útsendur sum medarbeiðari fyri MAF (Mission Aviation Fellowship) í Tanzania. Hann hevur síðani oktober 1998 haft ábyrgdina av bilum, bygningum og verkstaði á flogstøðini hjá MAF í Dodoma.

Allan Conrad er føddur í Kina. Foreldur hansara vóru sjálv missionerar, men hann er uppvaksin í Tanzania.

Hann er útbúgvin elektrikari í Danmark, og hevur arbeitt við byggiuppgávum í fleiri ymiskum londum.

Allan tosar eisini bretskt og swahili. Hetta er ein stórur fyrimunur í dagliga arbeiði hansara, har hann stendur á odda at útbúgva og rágeva teir lokalu tanzania-menn so hesir kunna átaka sær at arbeiða sum bilmsmiðir, umsjónarmenn og vaktir.

Allan Conrad er ein fjøltáttaður maður. Heitið so sum prædikumaður, bigrafstjóri og veiðumaður er bara nakað av tí sum sigur frá tí hann fæst við.

Hann elskar Tanzania, og livir fyri at fólkið í Tanzania kann koma til trúgv á Jesus Kristus.

Tí pakkar hann ofta landrowaran við flytbara biografi sínum og koyrir út til bygdirnar sum liggja rund Dodoma fyri at vísa Jesusfilmin.

Høvuðsuppgávan hjá MAF er júst at bjóða umsorgan fyri menniskjum í bæði andaligari og fysiskari neyð, í umráðum runt allan heim, sum eru sera torfør at koma til.

11. til og við 17. november kemur Allan til Føroya at greiða okkum føroyingum frá um MAF, og frá MAF arbeiði sínum.

# Stovna kunningarstovu í Vágum



*Eitt eyðkenni fyri Vágar er Trøllkonufingur, sum er umhildið ferðamál hjá fremmandafólki, sum vitjar oynna bæði á sumri og vetri*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vága Vinnufelag fer í næstum at lýsa eftir leiðara til nýggja kunningastovu í oynni. Ætlandi skal kunningarstovan hava opið allan dagin**

KUNNING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Nýggj kunningarstova verður sett á stovn í Vágum í næstum. Á fundi í gjárkvøldið skuldi Vága Vinnufelag viðgera málið, og ætlanin er at lýsa eftir leiðara fyrsta dagin.

Niels Olgar Joensen, formaður fyri Ferðavinnuni í Vágum, sigur, at Ferðavinnan í Vágum og Vága Vinnufelag nú eru løgd saman til eitt felag, sum umfatar øll vinnuvirki í oynni. Á fundinum í gjárkvøldið skuldi fyrsta felagsnevndin skipa seg.

Kunningarstova hevur verið í Vágum, men hevur bara verið opin hálva tíð, greiðir Niels Olgar Joensen frá. Hon hevur hildið til í kommunuhúsinum í Miðvági, men sum skilst, verður farið at leita eftir øðrum hølum, nú virksemið skal víðkast.

Ein leiðari skal setast í fulltíðarsarv, meðan eitt hálvtíðarstarv so verður afturat. Kommunurnar í oynni hava játtað at stuðla tiltakinum í fyrsta lagi í tvey ár, sigur Niels Olgar Joensen.

Vinnan í Vágum hevur verið tvíbýtt so at siga. Ferðavinnan hevur verið skipað í felag fyri seg undir heitinum Ferðavinnan í Vágum, meðan onnur vinna hevur verið í Vága Vinnufelag.

Á fundi í heyst varð avgjørt at leggja bæði feløgini saman, og eitur nýggja samtakið nú Vága Vinnufelag. Í tí er øll vinna í oynni samskipað, sigur Niels Olgar Joensen.

Nósabarnaprix 2002:

# Stór finala á Kambsdali

**Leygarkvøldið 9. november verður stór finala í Nósabarnaprix 2002. Sjey finalistar verða og fara teir at kappast um 10.000 krónur umframt sjálvan heiðurin**

BARNAPRIX
*Ingrid Bjarnastein*




*Leygardagin verður stóra finalan í Nósabarnaprix 2002 á Kambsdali*

Síðani mars mánað hava verið undankappingar kring alt landið til stóru finaluna í Nósabarnaprix 2002. Og nú leygardagin verður tann heilt stóra finalan á Kambsdali. Fyrireikararnir lova, at hetta verður eitt tað størsta barnatiltaki, sum skipað er fyri í Føroya søgu.

– Allir finalistarnir hava verið í ljóðstudio og sungið inn løgini, tey fara at framføra í finaluni, og vit hava longu hoyrt úrslitið av nýggju fløguni, og hon er framúrskarandi góð, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Á pallinum umframt teir sjey finalistarnar, verða BabyJames og Angela. Harafturat koma Brandur Enni og Benjamin Petersen eisini at framføra fyri teimum, ið leitað sær til Kambsdal leygarkvøldið.

Sjálv kappingin er stuðlað av Pizza 67 og høvuðsstuðul er Føroya Banki.

Vinnarin av Nósabarnaprixnum fær 10.000 krónur og harafturat sjálvan heiðurin. Teir sjey finalistarnir eru: Óluva Dam, Bjarki Hansen, Sharon Zakariassen, Durita Djurhuus, Olvheðin Jacobsen, Ninna Katrin Johansen og Sólfríð Bech.





*Børnini sótu sum á nálum, meðan Bjørg las fyri teimum um jólatræið hjá mumifólkunum*

# Væleydnað hugnakvøld við Mumi og Williami Heinesen

**Um 70 fólk, børn og vaksin, vóru samankomin til upplestur á Klaksvíkar Bókasavni mánakvøldið. Í samband við, at tað er norðurlendsk bókasavnsvika, var upplestrardagur á øllum bókasøvnum í norðurlondum, sum luttaka í felags bókasavnsvikuni**

HUGNI OG MENTAN
*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Tað var hugnaligt og fjálgt á bókasavninum í Klaksvík mánakvøldið, tá Bjørg Fjallsbak og Tina Purkhús lósu søgur fyri børnum og vaksnum.

Livandi ljósini settu ein eyka dám á hesa serstakliga hugnaligu løtu.

Børnini, eini 50 í tali, sótu so fitt á gólvinum, meðan Bjørg las fyri teimum um jólatræið hjá mumifólkunum.

Hetta var eitt sindur øðrvísi enn at sita fyri sjónvarpinum og síggja teknifilm, og heilt vist hevur eitt slíkt kvøld styrkt hugflogið hjá børnunum.

Eftir søguna sluppu børnini at tekna og seta lit á mumimyndir, og tá fóru tey vaksnu inn í lesistovuna at hoyra Tinu lesa søguna; "De stumme gæster".

Síðani var kaffi, saft, piparnøtur og siropskøkur at fáa. Bæði vaksin og børn hugnaðu sær óført, og stuttligt var at hitta fólk, tú sjáldan hevur høvi at skifta orð við.

Mánamorgunin var eisini upplestur fyri børnum á bókasavninum. Tá vóru tað skúlabókavørðarnir, ið skipaðu fyri søgulestri fyri triðju flokkunum úr skúlunum á Ziskatrøð og við Ósánna.

Annika Egholm, sum er leiðandi bókavørður á Klaksvíkar Bókasavni, sigur, at eitt slíkt kvøld hevur stóran týdning fyri bókasavnið.

Fólk, ið ikki vanliga ganga á bókasavnið, koma við børnum sínum; og tá tey hava verið einaferð, vitja tey gjarna aftur, sigur hon.

Klaksvíkar Bókasavn hevur árliga um 25000 útlán til góðar 3000 lánarar



*Rikka, Jón og Jan hugna sær við kaffi og siropskøkum*



*Eftir søguna, sluppu børnini at tekna, og ikki var sørt, at onkur mátti fáa eina hond*



*Eitt slíkt kvøld hevur stóran týdning fyri bókasavnið, sigur Annika Egholm, leiðandi bókavørður. Fólk, ið ikki vanliga koma á bókasavnið, vitja gjarna aftur eftir eitt slíkt hugnakvøld. Annika slapp ikki at halda frí hetta kvøldið, tí Randi hevði fingið hug á einari av teimum 25000 bókunum, ið savnið eigur*